# Misnýtsla av hagtølum- fimmarin enn einaferð

Gordon Ejdesgaard



Í fimmaranum mikudagin var evni sjúkrahúsverkið og bíðitíð hjá sjúklingunum. Lurtararnir høvdu høvið at ringja inn eins og vit høvdu møguleika at atkvøða um sjúkrahúsverkið ( vit) hava ráð til at stytta um bíðitíðina, so hon í mesta lagi verður tveir mánaðir.

Ein kann undra seg yvir spurningin, vit sum lurtarir skuldu svara uppá og siga ja ella nei til. Fyri tað fyrsta fingu vit eingi tøl á borðið fyri kostnaðin- um vit hava ráð at stytta um bíðitíðina. Givið er at tað als ikki letur seg gera at rokna hetta, uttan at serfrøðingarnir innan heilsuverkið hava verið við. Kaj Leo Johannesen sum uppskotstillari hevði einki annað boð enn gitingar. Men einki roknistykki, eingin dokumentatión bert gitingar. Áðrenn nakað tal kom á borðið høvdu fleiri lurtarar longu svara uppá spurningin- óivað!

Fyri tað næsta- og tað er her Dánjal Højgaard journalistur heldur øll fyri spott- fáa vit at vita, at umleið 70% av teimum, sum hava svara spurninginum hava sagt at vit hava ráð, meðan 30% siga at vit ikki hava ráð. Og um nakað er misnýtsla av hagtølum, so er hetta misnýtsla. Vit fáa ikki at vit hvussu nógv hava svara, og hava tí ikki tað minsta ánilsi av týdningin um av úrslitinum.

Harnæst er tað tann reini galimatiast at lata lurtararnar avgera málið við atkvøðugreiðslu. Hvør er møguleikin fyri at tey sum eru á bíðilista ella avvarðandi svara ja- sjálvandi hava vit pening til at stytta um bíðirøðina? Ella skulu vit kanska halda at tey sum eru í bíðirøð siga nei! Tey hava góða tíð at bíða? Sjálvandi skuldi útvarpið gjørt eina kanning (um tað fíggjarliga tilfarið/grundarlagið var í lagi). Og so t.d. ringt til tilvildarliga vald fólk og spurt. Fyri síðan at upplýst um úrslitið fyri og ímóti og tal av svarum.

Bæði spurningurin og hagtølini eru eitt skúladømi um hvussu ein tílík kanning ikki eigur at verða gjørd. Tað skuldi verið púra óneyðugt at skriva hesa viðmerking, men tá útvarpið beinleiðis misnýtir hagtøl og manipulerar, kann ein ikki annað enn at siga frá. Um hetta skyldast manglandi vitan hjá journalistinum, ja so kann nakað helst gerast við tað. Fái meg ikki at trúgva at tað kann vera við vilja og móti betri vitan, at hetta verður serverað fyri okkum lurtarum.

At enda vil eg spyrja journalistin:

Undir øðrum verðaldarbardaga doyðu fleiri fólk í ferðsluvanlukkum í USA enn amerikanskir hermenn í krígnum. Var tað meira vandamikið at koyra bil enn at vera hermaður?

# Klinikkassistentar og amalgan

Pál Weihe
*yvirlækni*



Í Sosialinum ígjár spyr Hanna Lisberg meg um kviksilvur í amalganinum, sum klinikassistentar eltu við berum hondum fyrr í tíðini, kann hava ávirkað heilsu teirra.

Kviksilvur finnist í ymiskum líki. Tað, sum vit her á deildini hava kannað, er lívrunnið kviksilvur, nevniliga methylkviksilvur. Í amalganfyllingum er kviksilvur í metallíki og so onnur metal eisini. Metalliskt kviksilvur verður lættliga tikið upp í mannalikamið, bæði gjøgnum lunguni, men eisini gjøgnum húðina. Við blóðinum verður tað síðani spjatt í kroppinum. Hetta slagið av kviksilvuri kann hava við sær bæði akuttar og kroniskar skaðar, serliga á heilan og á nýruni.

Hvussu nógv kviksilvur ein klinikkassistentur hevur verið úti fyri velst sjálvandi um, hvussu nógv kviksilvur var brúkt í arbeiðinum og hvussu arbeiðslagið var. Arbeiðslagið og reinførið viðvíkjandi kviksilvuri hevur óiva verið munandi annarleiðis, tá Kaaber starvaðist sum tannlækni, í mun til í dag, nú blandingin fer fram meira ella minni innilokað. Gangi út frá at flótandi metalliskt kviksilvur var blandað saman við einum pulvuri av øðrum metallum (silvur, tin, kopar og zink). Í sambandi við handfaringina av tí flótandi kviksilvurinum hevur verið góður møguleiki fyri at kviksilvurguva kom í andaleiðina hjá starvsfólki, bæði tannlækna og klinikkassistenti. Um kviksilvur, meira ella minni blandað, kom í samband við bera húð á fingrunum hjá assistentinum, ja so er tað sannlíkt, at eitt sindur er tikið upp gjøgnum húðina. Hvussu nógv kviksilvur, sum á henda hátt er tikið upp í kroppin er ilt at siga, men eftir míni meting kann tað væl hugsast, at onkur klinikkassistentur hevur fingið fitt av kviksilvuri í seg, sum kann hava sett síni merki á heilsustøðuna.

Við tað at kviksilvur spakuliga fer aftur úr kroppinum ber tó ikki til at kannað útsetilsi nógv ár seinni við at taka eina blóðroynd. Tað skal gerast meðan fólk eru í arbeiði ella stutt eftir.

# Jan Múller - "tíðinda alfaðirin" – uttan virðing fyri veruleikanum

Áki Andreasen

**Í einari útvarpssending, einari undirhaldssending nýtti ábyrgdarblaðstjórin á Sosialinum høvi at leggja eftir formanni Tjóðveldsifloksins og øllum fullveldisfólki fyri at taka patent uppá politikkin og fyri ikki at hava virðing fyri øðrum.**

Hetta undraði kortini ikki - tí vit sum royna at fylgja eitt sindur við vita at sjáldan man eitt blað hava framt so nógv bílagt arbeiði sum Sosialurin hevur gjørt og ger fyri Javnaðarflokkin.

**Jan Múller, Sosialurin og veruleikin**

Tað er ikki langt síðan at politisku málini vóru bæði ljósari og vónríkari enn tey eru í dag. Við fleiri royndum at fáa andstøðuna við - serliga Javnaðarflokkin, var arbeitt fram móti "tí breiðu semjuni" - men Javnaðarflokkurin vildi ikki; skilti ikki sín leiklut í andstøðu - og dagliga kom Sosialurin á gøtuna við oddagreinum sum niðurgjørdi øll fullveldisfólk, alla fullveldisætlanina og málrættað sáddi iva um alt, sum tá sitandi samgonga legði fyri dagin - hvar var virðingin fyri teimum ætlanunum sum tá vóru á skránni??

Í dag situr ábyrgdarblaðstjórin í ÚF og skuldsetur eini 10 - 12. túsund føroyingar fyri at hava tikið patent uppá sannleikan, og ikki virða tey sum ikki eru fullveldissinnaði.

Í sendingini rør ábyrgdarblaðstjórin framundir, at tað ikki var lætt at vera sambandssinnaður meðan fullveldissamgongan sat - hetta er so langt av leið at tað bæði er skammiligt og átaluvert.

Hetta er ábyrgdarblaðstjórin sum í sama andadrátti tosar um virðing fyri skrivi og talufrælsinum, fyri teimum sum hava eina aðra hugsan - tað er ikki rætt at Soaialurin hevur víst fullveldisætlanini virðing, tað er ikki rætt at Sosialurin vísti fullveldissamgonguni virðing, tað er ikki rætt tá ábyrgdarblaðstjórin í einari útvarpssending letur allar lurtarar vita at Tjóðveldisflokkurin og øll fullveldisfólk hava kanna sær patent uppá veruleikan og tað er so slettis ikki rætt at Sosialurin er ein óheftur fjølmiðil.

**Jan Múller, Sosialurin og sitandi samgonga**

Tað er vent í holuni á Sosialinum síðan Javnaðarflokkurin kom í Tinganes og Jóannes Eidesgaard bleiv løgmaður - sjálvandi.

Atfinningarsomu oddagreinirnar eru burtur - eingin viðgerð av vitleysum gerðum og umsitingarligum brølarum; alivinnan og landsstýrismaðurin í Vinnumálum er eitt dømi; Hans Pauli Strøm og setanin av leiðara á frítíðarskúlanum er eitt annað dømi. Studningurin til rækjuvinnuna, undirgravingarvirksemi í samband við miðnámsskúlan í Vági.

Eingin viðgerð av glantrileikinum við yvirlýsingum og "proformaav-talum", sum ikki verdar pappírið tær eru niðurfeldar á.

Bert ein myndafrásøgn fyri og onnur eftir - sum eitt royalt myndablað - uttan nakra ítøkjuliga viðgerð yvir høvur.

Kortini vil ábyrgdarblaðstjórin vera við at Sosialurin er blaði - sum óheft og áhaldandi lýsir samfelagsmál, sum óheft og áhaldandi er á varðhaldi; góðan morgun - tað er eitt sindur pínligt fyri Jan Múller sjálvan at fyrigykla øllum føroya fólkið nakað, sum er alt annað er sannheit.

Tað er langur vegur á mál áðrenn Javnaðarflokkurin sleppur takinum á Sosialinum. Men vit kunnu bert vóna - men tað er eingin grund til at "proklamerað" nakað sum einki hald er í.

# Ræðandi pseudo gudiligheit

Finnur Helmsdal
*tingmaður*



Uppskotið frá vinnunevndini, um at steingja fyri sølu av rundstykkjum og øðrum millum klokkan tíggju og tvey sunnudagar, er enn eitt dømi um ræðandi pseudo gudiligheitina, sum fær alt meira vald í samfelagi okkara. Um tað er sjúklig trongd at tekkjast ávísum veljaraskara, ella tað er ræðsla fyri sama skara, kann vera líka mikið. Tað, sum vit kunnu stað festa er, at ein stórur meiriluti av tinginum atkvøður fyri einum høpisleysum uppskoti, tí teir eru bangnir fyri hákirkjuligum- og øðrum veljarum. At man so við at samtykkja uppskoti ger seg inn á vanlig hampafólk og annars sendir eitt hykleriskt dupultmoralskt pseudo gudiligt signal úr tinginum, ja, tað má so vera harvið.

Um fólk sita á Hotel Føroyum ella á Hotel Hafnia klokkan hálvgum eitt sunnudagar og eta eina feitan fleskabita, sum verður skolaður niður við reyðvíni. Og um fólk hava drukkið eins snaps niðurundir, og fáa sær ein konjakk ella tveir omaná, ja, tað er ílagi, bara fólk ikki keypa rundstykki um somu tíð. Tað er, sambært tingsins hugburði, meira legalt at fara heim frá matstaði klokkan hálvgum tvey sunnudag við kenning, enn at fara ein fittan morguntúr klokkan ellivu við hundinum eftir rund-stykkjum. Tað er ílagi, at vit keypa pittsa, Ekstrablaðið og skókrem klokkan 22.58 hvørt kvøld í vikuni (eisini sunnukvøld), men vit skulu ikki sleppa at keypa rundstykki sunnumorgnar aftan á klokkan tíggju.

**Ræðist pseudo gudiligheit**

Um ávísir tingmenn so fegnir vilja umskapa Føroyar til eitt fundamentalistiskt samfelag, so skulu hesir bara tóna reint flagg. Men tað hava teir sjálvandi ikki politiskt dirvi til. Teir velja heldur at lansera eina sjúkliga pseudo gudiligheit. Onkur kann siga, at tað kanska ikki er so vandamikið, at tað er gott, at vit fáa frið sunnumorgnar. Men tað skal eingin ivi valda um, at vit ganga vandaleið. Tí í tráð vit at menn lata seg lokka til at fremja ivasamar politiskar dispositiónir, m.a. tí lokal áhugamál skulu lúkast, so verður samvitskan reinskað við at spæla sjónleik fyri teimum hákirkjuligu. Og ein kann ikki lata vera við at hugsa ella bera bangheit fyri, hvør næsti leikur verður, tá hetta uppskotið er komið ígjøgnum. Skal tað tá verða bannað at lýsa við rundstykkjasølu, ella skal talið á bakaríðum avmarkast. Ella skal alt, sum bara minnir um morgunmata sunnudag bannast. Kári P syngur um rundstykkir í sanginum Súrligar nætur, kanska skal hann bannast... Tað næsta verður helst, at fólk skulu í kirkju ella á møti klokkan ellivu sunnudag. Hví ikki lata føroyingi sjálvan avgera, um hvussu hann skipar vikuskiftið. Bara hann ikki ger seg inn á onnur, so eigur tað at vera hansara persónliga val, um hann svevur leingi, hugnar sær við morgunmatarborðið saman við sínum, ella hann fer íkirkju ella á møti. Rokni ikki við, at nakar fær betri sømdi på den ene dag, um hann hevur keypt rundstykkini áðrenn klokkan tíggju sunnumorgun.

Viðgangi, at hesar viðmerkingar eru ógvusligar og argandi, kanska langt úti, sum vanliga verður tikið til. Men eru mínar viðmerkingar so langt frá líka langt úti, sum uppskotið um skerdu rundstykkjasøluna sunnumorgnar er. Haldi, tað er eitt tað mest skítbýtta, sum er lagt fyri tingið seinastu nøgvu árini.